# Angu og Molinder Band á AME

**Tað vera í øllum fyrum tvey útlendsk nøvn millum nøvnini, ið luttaka á AME tiltakinum í Norðurlandahúsinum í apríl.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*





*Jonas Molinder er oddamaður í Molinder Band*
*mynd: moldinderband.com*

*Angu er grønlendskur singer/songwriter, ið syngur á enskum*
*mynd: SaN*

Tá AME-Føroyar verður vikuskiftið 13. og 14. apríl verður tað við bæði føroyskari og útlendskari luttøku. Atlantic Music Event hevur fingið myspace síðu, og á hesi síðu verður kunngjørt, at svenska Molinder Band og grønlendski Angu, umframt GBOB vinnarin Deja Vu luttaka.

### Grønlendskur singer/songwriter

Tá Angu vitjaði í Føroyum í heyst, lýstu fyrireikararnir hann sum tann grønlendska Teitur. Angu er føddur í Qaqortoq í Grønlandi, men býr nú í Danmark, har hann livur sum tónleikari og sangskrivari. Hann er vorðin somikið væl umtóktur í Danmark, at hann í fjør var í uppskoti til DMA heiðurslønina fyri besta nýggja navn.

Angu hevur altíð havt tónleikin í lívi sínum við ljóðførum og plátuspælara í heiminum. Sum tannáringur spældu Angu tungmálm og grunge, áðrenn hann vendi sær móti siðbundnum singer/songwriter tónleiki. Hann skrivar fangandi løg, sungin á enskum.

20 ára gamal flutti Angu til Nuuk, har hann royndi at fáa eina útbúgving innan KT, men hugurin til tónleikin var ov sterkur. Hann endaði tí sum upptøkutónleikari í einum lokalum upptøkuhøli. Í hesum arbeiði varnaðist stjórin á Atlantic Music røddina hjá Angu, og bjóðaði honum ein sáttmála. Fyrsta fløgan varð upptikin í ávikavist Grønlandi og Danmark, og seldi ikki færri enn 5000 eintøk í heimlandinum, umframt, at hon varð givin út í Danmark.

Í løtuni arbeiðir Angu við síni aðru fløgu. Hon kemur væntandi út í september. Tað er lítil ivi um, at okkurt nýtt lag verður á skránni, tá hann vitjar á AME.

### Svenskur bólkur

Hitt útlendska navnið er bólkurin hjá svianum Jonas Molinder, Molinder Band. Hann sigur sjálvur, at íblásturin til lagskrivingina kemur frá tónleikinum, ið merkti hansara barnaár, nøvn sum Stevie Wonder, Sting, Louise Hoffsten og Phil Collins. Bólkurin hevur givið tríggjar EP'ir út: Soul in me (2001), Life Spark (2003) og Kill Your Darlings (2004). Eftir ein steðg, har Jonas leitaði eftir nýggjum íblástri, stovnaði hann egið plátufelag, Tender Records. Eitt plátufelag har Jonas sjálvur stýrir síni tónlistarligu yrkisleið. Í apríl kemur fløgan In The Room With Fire, útgivin á nýggja felagnum. Tað verður sostatt ein plátuaktuellur bólkur, ið vitjar á AME.

Á myspace síðuni vísir AME á, at nógv fleiri nøvn vera avdúkaði. Tað er longu greitt, at vinnararnir av ársins fløgu hjá Dimmalætting og á Planet Awards, The Dreams og Teitur eru boðin við, enn er tó einki alment, um hesir bólkar fáa luttikið. Eisini hevur ljóða, at fleiri onnur útlendsk nøvn fara at luttaka.

# Náttarherbergið



Í einum brævi (november 1898) til Anton Tjekhov skrivaði Maxim Gorkij m. a.: ”Nú ein dagin sá eg ”Farbróðir Vanja”; eg sat har og sá sjónleikin og – græt sum eitt konufólk, hóast eg als ikki av lyndi eri sentimentalur. Eg kom til hús ørur, tungur í huga av tygara sjónleiki, skrivaði eitt langt bræv til tygara og – skræddi tað sundur.

(…) Tygum eru gávuríkur, stórt talent (…) Eg eri als ikki nakað gott menniskja, men eg græt, tá eg sá Vanja og hansara felagar, hóast tað er býttisligt at gráta og upp aftur býttari at siga frá tí. (…).

Til hetta svaraði Tjekhov: ”Eg takki tygum av heilum hjarta fyri bræv tygara. Tað er langt, langt síðani, at eg skrivaði ”Farbróðir Vanja,” eg havi ongantíð sjálvur sæð hann á palli…”

Í einum brævi (juli 1902) skrivaði Tjekhov til Maxim Gorkij: ”Eg havi lisið ”Náttarherbergið” (Gorkij hevði sent honum manuskriptið).

Onnur aktin er tann besta og sterkasta, og eg var líka við at dansa av frøði, meðan eg las. Áskoðarar, sum ikki eru vanir við slíkt, rýma úr sjónleikarhúsinum, og tygum kunnu siga farvæl til tygara umdømi sum optimistur.” (….).

Premierukvøldið, tá ”Náttarherbergið” varð framført í 1902, fekk Maxim Gorkij sín fyrsta muss frá tí vakra sjónleikaranum Marija Andrejeva. Hon gjørdist hansara elskarinna. Og nú verður so sjónleikurin ”Náttarherbergið” spældur í Meiaríinum.

Hetta er eitt drama um tað russiska fólkið og tess ræðsluvekjandi armóð í øldir.

Av egnum royndum kendi Gorkij tað russiska slummið, og tá ið hann við skriving av álvara gjørdi vart við seg, varð hann fleiri ferðir tveittur í fongsul. Heimskendi rithøvundurin Fjodor Dostojevskij, sum, kanska meira enn nakar skrivaði um tey útstoyttu og minni mentu í Russlandi, varð - eisini vegna skriving - beindur 10 ár í tukthús í Sibiria.



Lat tað verða sagt beinan vegin, at dramaið, við 15 lutaleikum, valla kundi verið framført betri enn tað, sum 7 sjónleikarar á pallinum í Tórsgøtu so meistarliga megna. Vónandi verða tey á pallinum í fleiri vikur fyri ikki at siga fleiri mánaðar. Pallur við ongum leiktjaldi; umhvørvið; sjúkligur heilaspuni; ræðandi sálarmynstur; alt hetta fær okkum at sita negld við stillisligum tárum og innibardum látri. Í hesum deyðans húsi fara øll í hundarnar uttan pílagrímurin Luka, alias Maxim Gorkij. Hóast elskaður av tí russiska fólkinum og hátt virdur úti og heima, doyði hann í húsavarðhaldi í 1936. Graml hoyrdist um, at hann varð dripin eftir boðum frá Stalin.

Til lukku øll tit, sum so avbera dugnaligt hava lagt rygg til hendan klassikaran, og last but not least eina tøkk til Kristinu S. Hansen, sum so sannførandi hevur framelskað okkum tað russisku psykuna – og ta føroysku!

*Heri Mohr*